## Stjól 300.000 krónur

Ein taskutjóvur í Danmark fekk ein sannan vinning, tá ið hann í Kastrup Lufthavn stjól eina tasku. Hetta var ein vandur taskutjóvur, sum bara vildi fáa okkurt lítið, ið var í taskuni. Men tað vísti seg, at heili 300.000 krónur vóru í taskuni. Taskuna átti ein koreanari, sum var ávegis umborð á flogfarð, har hann síðan skuldi umborð á eitt rannsóknarskip. Av einari ella aðrari orsøk hevði maðurin lummapeningin hjá øllum ferðafólkunum umborð, og hesi stóru upphædd situr taskutjóvurin nú inni við.



## Danir bjóða irakum vælkomnum

22 irakiskir tulkar, sum seinastu tíðina hava verið nógv umrøddir í Danmark, hava nú fingið avgreitt framtíð sína. Teir hava havt eitt berandi ynski um at fáa friðskjól í Danmark, og í gjár legði danski verjumálaráðharrin, Søren Gade, eitt uppskot fram, har irakarnir fáa loyv at koma til Danmark. Teir 22 tulkarnir hava eisini fingið tilboð um at taka familju sína við til landið.

# Valfepur í Danmark




*Starvsfólkini í eldrarøktini vilja hava munandi lønarhækking, og Danski Fólkaflokkurin tekur undir við kravinum.*

**Verkfall millum tey, sum ansa teimum eldru, og ivamál um donsku luttøkuna í Irak kunnu enda við fólkatingsvali, og flokkarnir brynja seg longu til valstríð**

DANMARK
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar er trýstið á donsku stjórnina vaksið nógv. Í fleiri dagar hava starvsfólk á ellis- og røktarheimum lagt arbeiðið niður og hava skipað fyri kravgongum um alt landið við kravi um munandi lønarhækking. Stjórnin hevur borið seg undan við at vísa á, at tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum gera sáttmála um millum annað løn, og tí skulu politikararnir ikki blandast upp í málið.

Hetta hevur ikki sissað verkfalsfólkið, sum krevur, at stjórnin skal lata kommununum fleiri pengar, so tær kunnu geva starvsfólkinum í eldrarøktini meiri løn. Og verkfalsfólkið fekk eina kærkomna hjálp fyrradagin, tá Danski Fólkaflokkurin boðaði frá, at hann tekur undir við kravinum um hægri løn til teirra, sum ansa teimum eldru.

–Anders Fogh Rasmussen má fáa hendurnar í lummarnar eftir meiri pengum, segði Pia Kjærsgaard, floksformaður.

Hesum vóru teir báðir stjórnarflokkarnir skjótir at vísa aftur, men politiskir eygleiðarar í Keypmannahavn siga, at so lætt sleppur stjórnin ikki. Teir ivast ikki í, at Danski Fólkaflokkurin fer at halda fast um kravið. Hinvegin kann stjórnin illa góðtaka tað, tí tað verður alt ov dýrt at leggja eitt tílíkt lønarkrav oman á skattalættan, sum tey konservativu vilja hava.

### Í Irak uttan heimild

Í morgun fekk stjórnin ein trupulleika afturat. Ein niðurlendsk útvarpsstøð vildi vera við, at niðurlendskir hermenn høvdu gjørt tænastu undir danskari leiðslu í Irak tann 3. mars í 2003, sjálvt um samtyktin at senda danskar hermenn til Irak bleiv ikki gjørd í Fólkatinginum fyrr enn tann 21. mars í 2003.

Mogens Lykketoft kunngjørdi alt fyri eitt, at hann fer at seta verjumálaráðharranum spurningar í sambandi við málið, og SF-formaðurin, Villy Søvndal, segði, at eru niðurlendsku tíðindini rótt, hevur stjórnin brotið grundlógina.

Stjórnin hevur hinvegin boðað frá, at hon er farin undir at kanna, um hald er í niðurlendsku tíðindunum. Verjumálaráðharrin, Søren Gade, er í Afghanistan, og hann hevur longu boðað frá, at hann veit einki um, at danskir hermenn vóru í Irak, áðrenn Fólkatingið samtykti tað.

### Brynja seg

Stríðið um lønarlagið hjá starvsfólkinum í eldrarøktini og nú ivin um luttøkuna í Irak hava av álvara skundað undir møguleikan fyri einum framskundaðum fólkatingsvali.

– Vit eru nú komin til tað tíðina í valskeiðinum, at ein skal altíð vera til reiðar, tí eingin veit, nær val verður, segði talskvinnan hjá Vinstra, Søs Marie Serup, við TV2 í morgun.

Sosialdemokratarnir eru eisini til reiðar, sigur Henrik Dam Kristensen, floksskrivari.

–Anders Fogh Rasmussen er vælkomin at skriva út val í heyst. Vit eru til reiðar til eitt valstríð, sigur floksskrivarin hjá Sosialdemokratunum við TV2.

SF og Radikali Vinstri hava eisini boðað frá, at teir eru til dystin fús, og tey konservativu útiloka heldur ikki eitt val í ótíð.

– Vit royna at ímynda okkum, at vit fáa val í heyst, sigur konservativi talsmaðurin Frank Korsholm við TV2.